Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 19.08.2026
Mál nr.: 25/32997
Málsviðgjørt: HP, TM

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin)
(Persónar, sum hava fingið tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón, kunnu byrja útgjald av eftirlønarsamansparing áðrenn almenna fólkapensjónsaldurin)

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
§ 9. Eftirlønarútgjald kann, við undantaki av stk. 5 og 9, í fyrsta lagi byrja, tá ið eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir, og í seinasta lagi tann dagin, hann fær fólkapensjón. Í samansparingartíðarskeiðnum er alt virðið, ið er knýtt at eftirlønarsamansparingini, at meta sum kapitaleftirløn við arvarætti, um eftirlønarsamansparari ikki hevur gjørt aðra avtalu. *Stk. 2.* Eftirlønarsamansparari boðar umvegis eftirlønarveitara TAKS frá útgjaldi. Boðast skal frá í seinasta lagi 2 mánaðir áðrenn, útgjald byrjar. Í fráboðanini til TAKS verður upplýst, hvussu og nær samansparda eftirlønin skal gjaldast út, undir hesum peningastovn og kontonummar, har samansparda eftirlønin skal flytast til. Býtið verður roknað av samansparda virðinum útgjaldsdagin og skal, undantikið stk. 4, stk. 5 og § 10, stk. 2, uppfylla hesar treytir:	**§ 9.** Eftirlønarútgjald kann, við undantaki av stk. 5 og 9, í fyrsta lagi byrja, tá ið eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir, og í seinasta lagi tann dagin, hann fær fólkapensjón. Í samansparingartíðarskeiðnum er alt virðið, ið er knýtt at eftirlønarsamansparingini, at meta sum kapitaleftirløn við arvarætti, um eftirlønarsamansparari ikki hevur gjørt aðra avtalu. *Stk. 2*. Hóast ásetingina í stk. 1 kann eftirlønarsamansparari, sum hevur fingið tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a., byrja eftirlønarútgjald, tá ið hann røkkur aldursmarkið fyri at fáa tillutaða framskundaða pensjón sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a. TAKS váttar, at útgjald av eftirlønarsamansparingini kann byrja, tá Almannaverkið hevur játtað umsókn.

1) Í minsta lagi 45% skal verða útgoldið sum lívslong veiting, lívrenta, ið sbrt. hesari løgtingslóg er ein eftirlønarskipan, sum verður útgoldin leypandi, so leingi tann, sum eigur og hevur stovnað tryggingina, er á lívi, men sum fellur burtur, tá ið viðkomandi doyr. 2) Í mesta lagi 55% kann verða útgoldið sum lutaeftirløn, ið sbrt. hesari løgtingslóg er ein eftirlønarskipan, ið verður útgoldin yvir eitt avtalað tíðarskeið, tó í minsta lagi 10 ár. 3) Í mesta lagi 15% kann útgjaldast sum kapitalútgjald, ið sbrt. hesari løgtingslóg er ein upphædd, sum verður útgoldin í einum. *Stk. 3*. Frá valda útgjaldsdegi sbrt. stk. 1 og 2 er valið bindandi, tó kann parturin, sum fer til lívlanga veiting, økjast, og tað er TAKS, ið gevur loyvi eftir skrivligari áheitan frá eftirlønarsamansparara umvegis eftirlønarveitara. *Stk. 4*. Hóast ásetingina í stk. 2, nr. 1, kann lívslanga veitingin ongantíð verða kravd at vera hægri enn 40 prosent av eini arbeiðaraløn, brutto, sbrt. sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Upphædd, ið er oman fyri ta kravdu lívslongu veitingina, kann flytast til lutaeftirlønarsamansparingina, um eftirlønaravtalan loyvir hesum. *Stk. 5*. Fyri eftirlønarsamansparara, har tað læknafrøðiliga verður staðfest, at hann, grundað á sjúku, hevur niðursettan væntaðan miðallivialdur, ber til at byrja eftirlønarútgjald, áðrenn eftirlønarsamanspararin nær fólkapensjónsaldri sambært lóg um almannapensjónir. TAKS váttar, at útgjald av eftirlønarsamansparingini kann byrja, tá Sjúkrahúsverkið hevur játtað umsókn. Upphædd, ið skuldi verið brúkt til lívrentu, kann í hesum føri í staðin verða brúkt til lutaeftirløn, um ikki onnur avtala er gjørd. 15 prosent av samansparingini kann verða útgoldin sum kapitalútgjald og restin sum lutaeftirløn. Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð nærri reglur.	*Stk. 3*. Ásetingarnar í stk. 4, um býtið av samansparda virðinum útgjaldsdagin, og í § 9, stk. 8, um útgjøld, eru galdandi fyri útgjøld sbrt. stk. 2. *Stk. 4.* Eftirlønarsamansparari boðar umvegis eftirlønarveitara TAKS frá útgjaldi. Boðast skal frá í seinasta lagi 2 mánaðir áðrenn, útgjald byrjar. Í fráboðanini til TAKS verður upplýst, hvussu og nær samansparda eftirlønin skal gjaldast út, undir hesum peningastovn og kontonummar, har samansparda eftirlønin skal flytast til. Býtið verður roknað av samansparda virðinum útgjaldsdagin og skal, undantikið stk. 4, stk. 5 og § 10, stk. 2, uppfylla hesar treytir: 1) Í minsta lagi 45% skal verða útgoldið sum lívslong veiting, lívrenta, ið sbrt. hesari løgtingslóg er ein eftirlønarskipan, sum verður útgoldin leypandi, so leingi tann, sum eigur og hevur stovnað tryggingina, er á lívi, men sum fellur burtur, tá ið viðkomandi doyr. 2) Í mesta lagi 55% kann verða útgoldið sum lutaeftirløn, ið sbrt. hesari løgtingslóg er ein eftirlønarskipan, ið verður útgoldin yvir eitt avtalað tíðarskeið, tó í minsta lagi 10 ár. 3) Í mesta lagi 15% kann útgjaldast sum kapitalútgjald, ið sbrt. hesari løgtingslóg er ein upphædd, sum verður útgoldin í einum. *Stk. 5*. Frá valda útgjaldsdegi sbrt. stk. 1 og 2 er valið bindandi, tó kann parturin, sum fer til lívlanga veiting, økjast, og tað er TAKS, ið gevur loyvi eftir skrivligari áheitan frá eftirlønarsamansparara umvegis eftirlønarveitara. *Stk. 6*. Hóast ásetingina í stk. 2, nr. 1, kann lívslanga veitingin ongantíð verða kravd at vera hægri enn 40 prosent av eini arbeiðaraløn, brutto, sbrt. sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Upphædd, ið er oman fyri ta kravdu lívslongu veitingina, kann flytast til lutaeftirlønarsamansparingina, um eftirlønaravtalan loyvir hesum. *Stk. 7*. Fyri eftirlønarsamansparara, har tað læknafrøðiliga verður staðfest, at hann, grundað á sjúku, hevur niðursettan væntaðan miðallivialdur, ber til at byrja

Stk. 6. Útgjøld sbrt. hesi løgtingslóg verða framd gjøgnum afturhaldsskipanina hjá TAKS skatta- og avgjaldsfrítt. *Stk. 7*. Kapitalútgjald, útgjald av lutaeftirløn og útgjald av lívslangari veiting byrja samstundis. *Stk. 8*. Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð nærri reglur fyri, hvussu eftirlønin verður útgoldin frá eftirlønarveitara. *Stk. 9*. Inngjald, sum persónur, fevndur av § 1, stk. 5 ella § 17, stk. 1, hevur goldið, kann rindast út aftur, hóast eftirlønarsamansparari ikki hevur nátt fólkapensjónsaldur. *Stk. 10*. Eftirlønarsamansparari skal í sambandi við útgjald sbrt. stk. 1 og í sambandi við fráboðan sbrt. stk. 2 í seinasta lagi tveir mánaðir áðrenn útgjald byrjar, lata eftirlønarveitara upplýsingar um peningastovn og kontonummar, har samansparda eftirlønin skal flytast til. *Stk. 11*. Eru neyðugu upplýsingarnar um peningastovn og kontonummar sbrt. stk. 10 ikki latnar eftirlønarveitaranum, tá ið útgjald byrjar, kann eftirlønarveitari flyta útgjaldið á depotkonto, sum eftirlønarveitari kann stovna til eftirlønarsamanspararan, og sum ikki fær tilskrivað avkast. Eru upplýsingar um peningastovn og kontonummar sbrt. stk. 10 ikki latnar eftirlønarveitara, tá ið útgjald byrjar, kann eftirlønarveitari flyta útgjald á sentrala og løgliga góðkenda, almenna konto hjá eftirlønarsamansparara, sum er knýtt at skipanini Vangin. *Stk. 12*. Ásetingarnar í stk. 2, um býtið av samansparda virðinum útgjaldsdagin, og í stk. 6, um útgjøld, eru galdandi fyri útgjøld sbrt. stk. 11. Fær eftirlønarveitari ikki onnur boð frá eftirlønarsamansparara í sambandi við útgjald sbrt. stk. 11, verður ásett, at 15 prosent av samansparda virðinum verður goldið út sum kaptitalútgjald, 45% sum lívrenta og restin sum lutaeftirløn.	eftirlønarútgjald, áðrenn eftirlønarsamanspararin nær fólkapensjónsaldri sambært lóg um almannapensjónir. TAKS váttar, at útgjald av eftirlønarsamansparingini kann byrja, tá Sjúkrahúsverkið hevur játtað umsókn. Upphædd, ið skuldi verið brúkt til lívrentu, kann í hesum føri í staðin verða brúkt til lutaeftirløn, um ikki onnur avtala er gjørd. 15 prosent av samansparingini kann verða útgoldin sum kapitalútgjald og restin sum lutaeftirløn. Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð nærri reglur. *Stk. 8*. Útgjøld sbrt. hesi løgtingslóg verða framd gjøgnum afturhaldsskipanina hjá TAKS skatta- og avgjaldsfrítt. *Stk. 9*. Kapitalútgjald, útgjald av lutaeftirløn og útgjald av lívslangari veiting byrja samstundis. *Stk. 10*. Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð nærri reglur fyri, hvussu eftirlønin verður útgoldin frá eftirlønarveitara. *Stk. 11*. Inngjald, sum persónur, fevndur av § 1, stk. 5 ella § 17, stk. 1, hevur goldið, kann rindast út aftur, hóast eftirlønarsamansparari ikki hevur nátt fólkapensjónsaldur. *Stk. 12*. Eftirlønarsamansparari skal í sambandi við útgjald sbrt. stk. 1 og í sambandi við fráboðan sbrt. stk. 2 í seinasta lagi tveir mánaðir áðrenn útgjald byrjar, lata eftirlønarveitara upplýsingar um peningastovn og kontonummar, har samansparda eftirlønin skal flytast til. *Stk. 13*. Eru neyðugu upplýsingarnar um peningastovn og kontonummar sbrt. stk. 10 ikki latnar eftirlønarveitaranum, tá ið útgjald byrjar, kann eftirlønarveitari flyta útgjaldið á depotkonto, sum eftirlønarveitari kann stovna til eftirlønarsamanspararan, og sum ikki fær tilskrivað avkast. Eru upplýsingar um peningastovn og kontonummar sbrt. stk. 10 ikki latnar eftirlønarveitara, tá ið útgjald byrjar, kann eftirlønarveitari flyta útgjald á sentrala og løgliga góðkenda, almenna konto hjá eftirlønarsamansparara, sum er knýtt at skipanini Vangin. *Stk. 12*. Ásetingarnar í stk. 2, um býtið av samansparda virðinum útgjaldsdagin, og í stk. 6, um útgjøld, eru galdandi fyri útgjøld

	sbrt. stk. 11. Fær eftirlønarveitari ikki onnur boð frá eftirlønarsamansparara í sambandi við útgjald sbrt. stk. 11, verður ásett, at 15 prosent av samansparda virðinum verður goldið út sum kaptitalútgjald, 45% sum lívrenta og restin sum lutaeftirløn.
§ 10. Eru eftirlønarsamansparingar hjá fleiri eftirlønarveitarum, kann eftirlønarsamansparari geva einum ávísum eftirlønarveitara heimild til at savna saman samlaðu virðini frá øllum eftirlønarveitarunum. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur fyri mannagongd og kostnaði. *Stk. 2.* Er samlaða eftirlønarsamansparingin hjá øllum føroyskum eftirlønarveitarum tilsamans minni enn 400.000 krónur við eftirlønaraldur sbrt. § 9, stk. 2, kunnu í staðin upp til 60.000 krónur rindast út sum kapitalútgjald, og restin verða útgoldið við upp til 2.500 krónum um mánaðin.	**§ 10.** Eru eftirlønarsamansparingar hjá fleiri eftirlønarveitarum, kann eftirlønarsamansparari geva einum ávísum eftirlønarveitara heimild til at savna saman samlaðu virðini frá øllum eftirlønarveitarunum. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur fyri mannagongd og kostnaði. *Stk. 2.* Er samlaða eftirlønarsamansparingin hjá øllum føroyskum eftirlønarveitarum tilsamans minni enn 400.000 krónur við eftirlønaraldur sbrt. § 9, stk. 4, kunnu í staðin upp til 60.000 krónur rindast út sum kapitalútgjald, og restin verða útgoldið við upp til 2.500 krónum um mánaðin.
§ 11 [...] *Stk. 6*. Í sambandi við viðgerðartíðina hjá eftirlønarveitara og TAKS, er eftirlønin at meta sum kapitalvirði, um ikki onnur avtala er gjørd og verður fyrst fevnd av ásetingunum í § 9, stk. 2 tann dag, ið ásettur er fyri útgjaldi.	**§ 11** [...] *Stk. 6*. Í sambandi við viðgerðartíðina hjá eftirlønarveitara og TAKS, er eftirlønin at meta sum kapitalvirði, um ikki onnur avtala er gjørd og verður fyrst fevnd av ásetingunum í § 9, stk. 4 tann dag, ið ásettur er fyri útgjaldi.
§ 16. TAKS hevur heimild at áleggja bøtur. Verður ásetingin í § 6 ikki fylgd, kunnu dagbøtur á 20.000 kr. verða álagdar fyri hvønn dag, ið fer út um fyrsta gerandisdag eftir 20. januar. *Stk. 2*. Heldur eftirlønarveitari ikki ásetingarnar í § 2, stk. 8, § 7, § 8 og § 9, stk. 2, sendir TAKS í fyrsta lagi eina ávaring. Um brotið ikki verður rættað, kann TAKS áleggja dagbót á 20.000 krónur, til viðurskiftini eru komin í rættlag. *Stk. 3*. Um brot á hesa løgtingslóg áhaldandi ikki verður rættað, kann eftirlønarupphæddin verða flutt til annan eftirlønarveitara at umsita uttan kostnað fyri eftirlønarsamanspararan. Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð nærri reglur.	**§ 16.** TAKS hevur heimild at áleggja bøtur. Verður ásetingin í § 6 ikki fylgd, kunnu dagbøtur á 20.000 kr. verða álagdar fyri hvønn dag, ið fer út um fyrsta gerandisdag eftir 20. januar. *Stk. 2*. Heldur eftirlønarveitari ikki ásetingarnar í § 2, stk. 8, § 7, § 8 og § 9, stk. 4, sendir TAKS í fyrsta lagi eina ávaring. Um brotið ikki verður rættað, kann TAKS áleggja dagbót á 20.000 krónur, til viðurskiftini eru komin í rættlag. *Stk. 3*. Um brot á hesa løgtingslóg áhaldandi ikki verður rættað, kann eftirlønarupphæddin verða flutt til annan eftirlønarveitara at umsita uttan kostnað fyri eftirlønarsamanspararan. Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð nærri reglur.